**Semja**
**millum**

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

**og**

**Maskinmeistarafelagið**

Omanfyri nevndu partar eru samdir um at leingja sínamillum sáttmálan til 1. juni 2026 við niðanfyri standandi broytingum:

1. **Lønin hækkar í sáttmálaskeiðnum soleiðis:**

| | |
|---|---|
| 1. juni 2024 hækkar lønin | 4,32 % |
| 1. juni 2025 hækkar lønin | 3,87 % |

2. **Grein 2 fær nýtt heiti: Yvirtíðarviðbót**

Grein 2 verður soljóðandi:

Stk. 1: Seravtalur kunnu gerast fyri maskinmeistarar um viðbót fyri arbeiði uttan fyri vanliga arbeiðstíð og fyri yvirtíð.

Stk. 2 Samsvar skal vera millum ta upphædd sum verður veitt í viðbót og avtalaða miðal meirabeiðstíð yvir eitt tíðarskeið."

Stk. 3: Avtalur um yvirtíðarviðbót skulu vera skjalfestar og eru partur av setanini. Nevndu viðbøtur hækka til eina og hvørja tíð við sama prosenti sum lønirnar. Ásetingin er galdandi fyri avtalur gjørdar eftir 1. september 2024.

3. **Nýggj grein 3**

Heiti: Leiðarar og serfrøðingar

Grein 3 verður soljóðandi:

Stk. 1: Tá Maskinmeistari, verður settur sum leiðari ella serfrøðingur, eru tær vanligu fyrisitingarligu treytirnar ikki galdandi fyri flokking av lønini. Lønin hjá leiðaranum ella serfrøðinginum avtalast individuelt millum arbeiðsgevaran og tann einkulta leiðaran ella serfrøðingin.

KL
AMB

Stk. 2: Lønin hjá leiðarum ella serfrøðinginum skal avspegla tign og ábyrgd í starvinum, har hædd verður tikin fyri lønarlagnum sum annars er á starvsplássinum. Harafturat skal lønin somuleiðis avspegla kvalifikatiónirnar, útbúgving, starvsroyndir og ágrýtni.

Stk. 3: Árliga hevur leiðari ella serfrøðingur rætt til eina starvssamtalu við sín leiðara um starvs- og lønarviðurskifti.

Stk. 4: Annars eru reglurnar í § 18, stk. 3 um ser- og eginavtalur galdandi.

Stk. 5: Leiðarar og serfrøðingar hava møguleika at søkja um ráð og vegleiðing hjá Maskinmeistarafelagnum um lønar- og setanarviðurskifti.

Allar eftirfylgjandi greinar verða rættaðar tilsvarandi.

**4. Grein 5 Vanlig arbeiðstíð**

Lagt verður afturat verandi orðing í stk. 1: "Dagliga arbeiðstíðin verður at liggja innan fyri tíðarskeiðini frá og við mánadag til og við fríggjadag millum kl. 6.00 og 18.00."

Stk. 1. verður harvið soljóðandi:

"Vanliga arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, har eingin onnur avtala er gjørd. Dagliga arbeiðstíðin verður at liggja innan fyri tíðarskeiðini frá og við mánadag til og við fríggjadag millum kl. 6.00 og 18.00."

**5. Grein 7 yvirtíðargjald**

Eftir yvirtíðargjøldini í grein 7, stk. 3, verður sett inn soljóðandi:

Tá arbeiði endar aftaná midnátt, og færri enn 6 tímar eru, til byrjað verður aftur, verður ikki farið niður í løn.

Í stk. 4 verður "07.00 og 18.00" broytt til "06.00 og 18.00".

**6. Grein 18, stk. 2 verður broytt at ljóða soleiðis:**

"9,35%" verður broytt til "10%" og verður flutt til grein 7, stk. 7.

**7. § 22. Gildi sáttmálans**

"*1. juni 2022*" verður broytt til "*1. juni 2024*", og "*1. juni 2024*" verður broytt til "*1. juni 2026*".

**8. Í lønartalvuni verða gjørdar hesar broytingar:**

- Lønarstig 1-4 fellur burtur

- Strikan millum lønarstig 22-23 verður strikað
- Loddrætta orðingin "Deildarleiðara- og leiðarastørv" verður strikað
- Gráligi liturin á lønarstig 23-28 verður gjørdur hvítur samsvarandi við lønarstig 5-22.
- Viðbótin á kr. 1.150,00 verður strikað.
- Maskinistar verða løntir á stig 5-12 í lønartalvuni
- Nýggj orðing verður soljóðandi: "Maskinmeistarar sum eru leiðarar og serfrøðingar gera ser- og eginavtalur"

Nýggj lønartalva er hjáløgd í fylgiskjali 1.

**Tórshavn, 9. september 2024**

**Fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Kristoffur Laksá, samráðingarleiðari

Høgni Hansen, næstformaður

**Fyri Maskinmeistarafelagið**

Arnfinn Bech, formaður

Regin Olsen, næstformaður